## TILTØK

**Losjan í Havn**
Mánakvøldið 30. september kl. 20.00 verður minningarfundur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti. Richard Schwartson talar. Heimasíða www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Vincenzo Brocanelli í Mariukirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Leygardag hava skótarnir loppumarknað fyri »Skótahjálpina«.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 18.00 Familjumøti (sjónvarpsupptøka). Offur til svøltandi í Afrika.
Mánadag kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Í kvøld og fríggjakvøldið kl. 20.00 Møti í Ítróttarhøllini í Runavík við bróðir Yun frá Kina.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúlin, kl. 18.00 Møti við Anniku við Skipá.

**Ebenezer**
Barnamøtini byrja í dag kl. 17.00.
Leygardagin kl. 16.00 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Familjumøti, kl. 21.00 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v. Sørin Steinhólm.
Mánakvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti og kl. 20.00 venur Manskórið.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 morgunmøti v/ Dánjal á Dul Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 19-19.45 Bíbliutímin, kl. 19.45-20.15 Kaffisteðgur, kl. 20.15-21.00 Bønartímin.
Fríggjakvøldið kl. 18.00 ATAP Kids (Barnaklubbur).
Leygarkvøldið kl. 20.00 Missiónsmøti við Harald Mydland, Sarons Dal, Noreg.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti og sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin 29. sept.: Ongin fundur vegna sjúku.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Glæman, Kvívík**
Sunnudagin kl. 19.00 verður møti í Glæmuni við vestmenningum o.ø., sangbólkurin Gittit syngur.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Hóskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20.00 Møti í Ítróttarhøllini í Runavík við bróðir Yun frá Kina.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Ann Randi, Djóna og Sigrun. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Ítróttahøllin í Runavík**
Møti við Eivind Frøen og bróðir Yun úr Kina verða hóskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Á fundinum sunnukvøldið kl. 18.00 talar Jan Zachariassen úr Gøtu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Gøta**
Sunnudagin 29. sept. verða møtini broytt soleiðis: Kl. 11.00 Familjumøti, kl. 12.00 Máltíð, kl. 12.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarbólkur (ung) hjá Hannu Poulsen, kl. 20.30 Bønarbólkur (menn) hjá Pól Thomsen.
Mikukvøldið kl. 20.00 Møti v/ Harald Midland.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Familjumøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Alphaskeið/ Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 28. sept. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 og leygarkvøldið kl. 20 Møti við suðuroyingum, sum at koma at tala og syngja.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18.00 Møti við suðuroyingum, sum tala og syngja. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Fríggjadagin kl. 20.00 Evangeliskt møti, vitjan úr Sarons Dal.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00.
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna konfirmatión.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Jónsvein og Heidi Bech. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Betania, Porkeri**
Møti verður í kvøld kl. 20.00 Áki Andreassen talar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur. Talari: Áki Andreasen, kl. 21.00 Útifundur, um viðrar.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Losjan í Havn**
Fríggjadagin kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 29. september verður gongutúrur av Sundi til Norðradals og gjøgnum líðina til Syðradals. Gingið verður um 4 tímar, léttur/miðal túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

## 75 ÁR

Sunnudagin 29. sept. verður Anna Katrina í Skálanum, Klaksvík 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 28. sept. í kjallaranum í Betesda frá kl. 18.00.

## 80 ÁR

Fríggjadagin 27. september verður Hasse Kragesteen, Tórshavn 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## KONFIRMATIÓN

**Konfirmantar í Bønhúsinum í Øravík sunnudagin.**

Petra Christiansen, Tvøroyri
Sólvá Heidi Dimon, Trongisvágur
Joan Joensen, Tvøroyri
Leon Gunnar Johannesen, Tvøroyri


## Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele

"Løgnidómurin at fáa tingini at eydnast er hart arbeiði – tí er tað ein løgnidómur fyri tey flestu"
Mark Twain



Føroya Tele hevur seinastu árini støðugt víðkað um talið av tænastum, sum vit bjóða kundum okkara. Tað hevur ført við sær stóran vøkstur í fjøltættinum av uppgávunum á KT-deild okkara. Ein vøkstur, sum vit vænta heldur fram komandi árini.
Fyri framhaldandi at veita okkara starvsfólki á Føroya Tele bestu arbeiðsumstøður á KT-økinum, so at kundar okkara kunnu fáa bestu tænastuna, søkja vit eftir einum supportara til dagligu tænastuveitingina í fyritøkuni.

Arbeiðið umfatar:
- Uppseting og klárgering av teldum
- Uppsetan av prentarum
- Brúkarastuðul
- Backupp
- Uppfylgjing og skráseting av útgerð
- Annað fyrifallandi arbeiði á deildini

Viðkomandi skal hava góðar menniskjansligar eginleikar og skal kunna samstarva væl við brúkarar við sera ymiskum tørvi og fortreytum.

Royndir við einum ella fleiri av fylgjandi er ein fyrimunur:
- Windows NT 4.0 /Windows 2000/ Windows XP
- MS Office 2000, Pro

Føroya Tele skipar fyri neyðugum eftirútbúgvingum og skeiðum í Føroyum ella uttanlands.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Starvsmannafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Lars Jensen (lj@ft.fo) á KT-deildini ella til Starvsfólkadeildina á tlf. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. oktober 2002 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

ella til ft@ft.fo

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutningunum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!




## FILMSTEIGURIN

# K-19

Bygdur á eina autentiska hending viðger filmurin samanstoytin – og samstarvið – millum tveir álítandi kavbátaoffiserar (Harrison Ford og Liam Neeson) í juni- juli 1961 um borð á sovjetska kjarnorkubátinum K-19 á jomfrúferðini, sum samstundis verður tann seinasta ferðin. Kavbáturin var plágaður av óhappum, og ein leki í køliskipanini hótti við at føra eina niðursmelting í øðrum reaktorinum – við stórum vanda fyri einum kjarnorkuleka, sum eftir øllum at døma hevði ført til Triðja Heimsbardaga.
Við góðum innsastsi setti manningin lívið í vága fyri at sleppa undan katastrofuni…





# Niels Neutron

Niels Neutron uppfinnur dimsar og dingenótar, ikki allir eins væleydnaðir, emn teir gera hansara ganska almindiliga gerandisdag meira spennandi. Tað eydnast m. a. Nielsi at minka lærarinduna til eina rættuliga ministødd.

Ein av hansara betri væleydnaðu uppfinnilsum er robothundurin, sum hevur serstøk evni at spreingjast í luftina og sjálvur seta seg samanaftur.

Men sum øll onnur børn, so droymir Niels um einaferð at sleppa undan foreldrunum, sum altíð hava so nógvar troyttandi reglur um, hvat hann kann gera og ikki gera.

Og tá nýggja frítíðarparkin letur upp, sleppur Niels sjálvandi ikki hagar. men so kann man jú altíð sníkja seg út…

Men Niels fær í góðari tíð ynskið sítt uppfylt, tí meðan hann og vinirnir fara ein túr við rutsjubananum, burturflytur ein bólkur av óvinarligum, grønum, eggformaðum rúmdarverum ikki bara foreldrini hjá Nielsi, men øll foreldrini í býnum.

Teir fyrstu dagarnir uttan foreldranna evindarligu formaningar er stuttligir, men skjótt fata børnini, at tað er eingin, sum kann hjálpa teimum, tá eitthvørt er á vási.

Niels setur tí heilan at arbeiða yvir og finnur skjótt út av, hvar øll foreldrini eru.

Tað vísir seg skjótt, at Niels og vinirnir mugu ein túr út í rúmdina at taka dystin upp móti rúmdarverunum fyri at fáa foreldrini aftur.

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




**Frumsýning**
Fríggjadagin 27.09. kl. $20^{30}$ — Fríggjadagin 27.09. kl. $23^{15}$
Leygardagin 28.09. kl. $20^{30}$ — Leygardagin 28.09. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 29.09. kl. $20^{00}$ — Sunnudagin 29.09. kl. $22^{45}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




Fríggjadagin 27.09. kl. $16^{30}$ — Fríggjadagin 27.09. kl. $18^{30}$
Leygardagin 28.09. kl. $16^{30}$ — Leygardagin 28.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 29.09. kl. $16^{00}$ — Sunnudagin 29.09. kl. $18^{00}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 27.09. kl. $17^{00}$ — Leygardagin 28.09. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 29.09. kl. $16^{30}$




Fríggjadagin 27.09. kl. $23^{30}$ — Leygardagin 28.09. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 29.09. kl. $23^{00}$




Fríggjadagin 27.09. kl. $21^{00}$ — Leygardagin 28.09. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 29.09. kl. $20^{30}$




Fríggjadagin 27.09. kl. $19^{00}$ — Leygardagin 28.09. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 29.09. kl. $18^{30}$